# Maskinmeistararar

**søkjast til Elfelagið SEV**

Tvey størv sum maskinmeistarar á Sundsverkinum eru leys at søkja til setan frá umleið 1. november 2003.

**Starvið:**
Sundsverkið hevur 5 dieselmotorar upp á tilsamans 46,7 MW. Brennievnið er tungolja. Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Sundsverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktararbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð eru altíð tveir maskinmeistarar á vakt, og skulu umsøkjararnir hava førleika til at átaka sær ábyrgdina av vaktini (sum 1. maður á vakt), men eru lýstu størvini sum útgangsstøði roknað sum 2. maður á vakt. Allir maskinmeistararnir á Sundsverkinum luttaka í vaktarskipanini.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving t.v.s. víðkað maksinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv ella javnbjóðis útbúgving.

**Lønin:**
Størvini eru lønt sambært 4. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarasfelagið. Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan. Byrjunar- og endalønin í 4. lønarfloki er í løtuni netto ávikavist kr. 21.305,49 og kr. 22.936,01 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldið tilsamans ávikavist kr. 2.318,21 og kr. 2.495,63 um mánaðin.
Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn. Verður viðkomandi seinni settur sum 1. maður á vakt fyri styttri ella longri tíðarskeið, verður lønin fyri ta tíðina sambært 5. lønarflokk.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinastda lagi tann 15. september 2003.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen, deildarleiðara á Maskindeildini, báðir á tlf. 346800.

Tórshavn, tann 22. august 2003.

**Elfelagið** SEV

# Frá Zarepta

Kvinnustevna verður í døgunum 19. - 21. september 2003.

**Evni:** *Lívsvirðir*

Tekning á **tlf. 332140 ella 284040**.

*Verið vælkomnar í Zarepta*

# Til sølu Monterey 245 Cruiser



**Monterey 245 Cruiser og bátavognur til sølu**
Mál á bátinum: longd 8,2m breidd 2,6m og vekt 2.700 kg.
Motorurin er ein Mercruiser 5,0L MPI bensin V8 260hk
við Z drev og Bravo 3 skrúvu, ferðin er uml. 43 mph
Báturin er sera væl útstýrdur so sum wc, brúsu og vask
innan og uttan, heitt og kalt vatn, septitanga og vatntanga,
køliskáp, micro ovnur, 2 stk. kóki plátur, radio við CD o.a.,
220V landstreym, 220V/2000W generator, GPS, VHF,
Webasto oljufýr og ein 3,5 tons Brenderup bátavognur.
Er væl egnaður til yvirnátning av 4-5 fólkum.
Báturin og vognurin eru frá april 2003.
Nýprísur í Føroyum við útgerð kr. 710.000
Nú til sølu fyri 530.000 kr.
**Tlf. 511661**

# BARRVØRÐAR

Sóknast verður eftir tveimum vælvaksnum og skjótum barrvørðum at byrja beinavegin

YERTSHÚSIÐ
hjá Restorff
tel 21 35 10

Sosialurin 341800

# Formaður

Søkt verður eftir einum dugnaligum formanni við royndum innan annlegsarbeiðið, at byrja beinanvegin, løn eftir avtalu.

JKH ENTREPRENØRAR
✆ 44 92 70 - 22 72 55 - Fax. 44 92 71
• JØRÐ & BETONG • TIMBURARBEIÐI • HÚS - HÚS - HÚS

# Lastvognsførari

Søkt verður eftir einum lastvognsførara at byrja beinanvegin, løn eftir avtalu.

JKH ENTREPRENØRAR
✆ 44 92 70 - 22 72 55 - Fax. 44 92 71
• JØRÐ & BETONG • TIMBURARBEIÐI • HÚS - HÚS - HÚS

# Maskinførari

Søkt verður eftir tveimum maskinførarum at byrja beinanvegin, løn eftir avtalu.

JKH ENTREPRENØRAR
✆ 44 92 70 - 22 72 55 - Fax. 44 92 71
• JØRÐ & BETONG • TIMBURARBEIÐI • HÚS - HÚS - HÚS

# FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 28, P/F Samvinnufelagið, 360 Sandavágur.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Johan Edvard á Plógv, 360 Sandavágur.
**Innkomin í nevndina:** Arnbjørn Svabo Egholm, Lítlatrøð 6, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 22. August 2003*

*Kristin Balle*

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 23. august 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, hevur góðkent:

**Sláturvirkið hjá P/F Sørvágs Laks í Sørvági**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

*Nú eisini úr Føroyskum gróti*



Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

# Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og aluminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard



# Skrivstovuhøli í Tórshavn til leigu

Ogn í Mikinesgøtu verður við hesum leigað út.



Talan er um eitt ella møguliga tvey leigumál av allari ovaru hæddini, sum er 300 $m^2$, og 100 $m^2$ av niðaru hæddini. Leigumál kann byrja frá 1. mai í ár, ella seinni.

Á ognini eru góð parkeringsviðurskifti.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna og spyrja eftir Niels Winther Poulsen ella skrivaranum.

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9**

**Halgir Winther Poulsen, adv.**
**Magnus S. Petersen, adv.**
**Fríða Patursson, adv.**
**Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.**
**Christian Andreasen, adv.**
**Niels Winther Pouslen, adv.**

**Tlf. 311145**

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

## 620 Runavík

Søkt verður eftir **ØKONOMU** – 40 tímar um vikuna – at byrja 1. oktober 2003 ella eftir nærri avtalu.

Løn- og setunarviðurskifti sambært avtalu við Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

Umsókn, saman við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. september 2003.

# Harmonikutúrur til sølu

Harmonikutúrur frá 1.-3. sept. til sølu til 2 pers. við kamar.

**Ring 216424, spyr eftir Símun**

# Havnar KFUK-skótar

## Vit byrja aftur 27. august

**Spírur og Títlingar**
mikudag kl. 1630 til 1800

**Skótar og Ungdómsskótar**
hósdag kl. 1900 til 2100

**Spírur**, eru gentur í forskúlaaldri og 1. flokki
**Títlingar**, eru gentur sum ganga í 2. til og við 4. flokki
**Skótar**, eru gentur sum ganga í 5. til og við 8. flokki
**Ungdómsskótar**, eru tey frá 9. flokki og eldri.



**Endamálið:**
er at útinna skótaarbeiði samsvarandi alheims skótalóg og skótalyfti og at boða gleðiboðskapin fyri skótum og títlingum samsvarandi evangelisk-luthersku játtanini.

**Arbeiðsgrundarlag:**
er gjøgnum skótaarbeiði at útvega tær best møguligu treytir fyri einum felagsskapi, har frælsi fyri einstaklingin er størst møguligt, samstundis sum ein átekur sær ábyrgd fyri felagsskapinum.
Samsvarandi skótalóg og -lyfti vil skótarørslan, við sínum arbeiði á tjóðskaparligum og alheims stigi hjálpa skótunum at virka fyri góðum vinalagi tjóðanna millum.

Hevur tú hug at gerast KFUK-skóti, ert tú vælkomin í skótahølini í KFUK, Varðagøtu 9 nevndu dagar.

# 6 Persónar Toyota Picnic 2,0



**Toyota Picnic 2,0**
Árg. 06/98 km. 78.000 kr. 173.000,-
ÚTGJALD BERT 35.000,-
Til 6 ferðandi, alu felgur og vetradekk
á vanl. felgum, fj. stýrt sentrallás og el rútar
framman og aftan.
Bilurin er í sera góðum standi.

**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 217300 - www.bilfridkan.fo

Runavíkar kommuna søkir eftir:

# Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

Barnagarðurin á Mýrunum er stovnur hjá Runavíkar kommunu við plássi til 94 børn. Stovurnar eru skipaðar við 2 vøggustovum við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari og einari barnagarðsstovu við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmið. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

Vit ynskja tí at umsøkjarin:

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirblikk og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir pedagogi at arbeiða 35 ella 40 tímar um vikuna.

Setan verður frá 1. oktober 2003 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogar ikki søkja, verður hjálparfólk sett í starv í avmarkaða tíð.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 5. september 2003, kl. 12.00.

**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 211723 · Fax 321722*

Sosialurin 341800

W W W . S O S I A L U R I N . F O